# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Tøkk



Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á gullbrúdleypsdegi okkara, takka vit hjartaliga við ynskjum um eini gleðilig jól og gott nýggjár.

**Hjørdis og Oddfríður**

## Tøkk



Hjartaliga tøkk til tykkum, sum heilsaðu mær á 60 ára degnum við uppringing, fjarritum, blómum og tit mongu, sum komu í Eydnuna at halda dagin saman við okkum.
Hjartans tøkk øll somul.
Somuleiðis gleðilig jól og gott nýttár ynskist vinum og kenningum.

**Edmund & Edfríð Joensen**

**Andlát**

1. desember
Daniel Jóhann Joensen, skipsførari, ættaður frá Gjógv, búsitandi í Nordby á Fanø, 73 ár.
Oddmar Lauritsen á Fossi Sørvágur 67 ár.

3. desember
Hans Vilhelm Joensen, vanliga nevndur Limm á Sandi, 77 ár.
Jóhanna Ziska, fødd Kamban í Klaksvík, 93 ár.

6. desember
Randi Johansen, fødd Jørgensen, 53 ár

8. desember
Elina Joensen úr Skúvoy, 91 ár.

Anker Mortensen, listamálari:

# Vindurin blæsur í Snarskivuni

Hósdagin 9. desember 2004 kl. 16 lat Anker Mortensen listamaður upp framsýning í Snarskivuni í Havn.

Listaframsýningin, ið hevur fingið heitið "Vindurin blæsur, hvar sum hann vil", er opin gerandisdagar frá 9-16, tó hósdag til kl. 18.

Á framsýningini, ið er opin fram til 1. februar 2005, eru 14 oljumálningar.



*Anker Mortensen, listamaður, hevur framsýningina "Vindurin blæsur, hvar sum hann vil" í Snarskivuni í Havn*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Nýggir stjórar á Hotel Hafnia

**P/F Hotel Hafnia hevur sett Ásu Johnsdóttir og Birnu Gaard sum nýggjar stjórar á hotellinum frá 1. januar 2005**

Ása Johnsdóttir er 39 ára gomul. Hon hevur starvast á Hafnia síðan 1985, tey seinastu 10 árini sum leiðari av móttøkuni.

Birna Gaard er 32 ára gomul og útbúgvin Akademi Økonom frá hotelskúla í Keypmannahavn. Seinasta árið hevur hon hevur starvast sum konferencestjóri á Hafnia.



*Ása Johnsdóttir og Birna Gaard verða nýggju stjórarnir á Hotel Hafnia*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Ásla Rannvá Svensson, listakvinna:

# Innaralandslag í Smiðjuni

*Ásla Ránnvá Svensson listakvinna hevur listaframsýningina "Innaralandslag" í Smiðjuni í Lítluvík*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



Fríggjadagin 10. desember lat listakvinnan Ásla Ránnvá Svensson upp listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík.

Á framsýningini er umleið 50 ymiskir málningar. Heitið á framsýningini er "Innaralandslag"

Framsýningin er opin til og við sunnudagin 12 desember. Fríggjadagin var opið frá kl. 16.00 - 19.00 Leygardagin og sunnudagin er frá kl. 15.00 - 20.00.